# Breiðasta valdømi vann ein mann afturat

**Eysturoyar valdømi fær hesuferð tveir eykavaldar í og við at Bill Justinussen kemur afturat - men Kári »Post« situr sera leysur so leingi finteljingarnar ikki hava konfirmerað hann**

VALIÐ 2004
*Búi Tyril*



*Veitslurómur heima hjá Bill Justinussen*
*Foto: Maria Olsen*

Eysturoyggin fær, við fyrivarni móti fínteljingum, tveir eykavaldar tinglimir í hesum valskeiði, ístaðin fyri seks sum talið var valskeiðið frammanundan. Hetta merkir at landsins breiðast umboðaða valdømi styrknar úr seks upp í sjey tinglimir.

Tann sjeyndi tingmaðurin í Eysturoy verður í hesum valskeiði Bill Justinussen (Miðflokkurin) við 205 atkvøðum; hin eykavaldi er Kári »Post« Højgaard (Sjálvstýrisflokkurin) við 226 atkvøðum, sum soleiðis er afturvaldur. Teir umdømisvaldu fyri eysturoynna eru annars, sorterað eftir persónligum atkvøðum, toppskorarin Torbjørn »Tobbi« Jacobsen (Tjóðveldisflokkurin) við 465 atkvøðum, Andreas Petersen (Javnaðarflokkurin) við 450 atkvøðum, Jógvan á Lakjuni (Fólkaflokkurin) við 409 atkvøðum, Alfred Olsen (Sambandsflokkurin) við 393 atkvøðum, Edmund Joensen (Sambandsflokkurin) við 383 atkvøðum.

Sum skilst eru tó enn ikki allar súður syftar. Marginalarnir eru nevniliga smáir hvat viðvíkur tí eykavalda hjá Sjálvstýrisflokkinum; skuldi fínteljingin givið allarminsta útslag tann negativa vegin so kann Suðursteymoy ístaðin fáa Sjálvstýris tinglimin.

Tað var soleiðis spenningur inn í tað allar síðsta um tingmanningina hjá Eysturoynni, og er tað enn.

– Hetta er ringt fyri nervarnar, viðmerkti Kári P. Højgaard.

– Men eg má siga at bæði Eysturoyggin og Sjálvstýrisflokkurin fingu eitt gott val.

– Nú fáa vit so at síggja hvørjar møguleikar vit fáa at vera við í komandi landsstýri; vit hava drúgvar royndir í landsstýrisarbeiði og vóna at sleppa upp í part eisini hesuferð.

Hjá Bill Justinussen var sum vera man veitsla í nátt. Saman við ætt, vinum og kenningum savnaðust stillarar og veljarar saman í stórum tali í húsunum hjá hjá Bill Justinusen á Glyvrum.

– Hetta var ein stórur sigur fyri Miðflokkin so væl sum Eysturoynna, staðfesti ein fróur Bill Justinussen aftan á at valúrslitið stóð greitt.

– Vit kunnu fáa eina sterka støðu og vónandi høvi til stóra ávirkan.



*Heima hjá Kára P. Højgaard. Standandi til vinstru Dánial Petur »Piddi« Hansen, valevni hjá sjálvstýrisflokkinum, fekk 103 persónligar atkvøður*
*Foto: Maria Olsen*

# Vinnulívsins oyggj

**Tað sigst at í Eysturoy hevur meira enn helvtin av landsins vinnulívi heimstað - tað politiska landslagið váttar eisini at so er.**

LØGTINGSVALIÐ
*Búi Tyril*

Tað hevur leingi verið alment kent at ein sera stórur partur av tí føroyska vinnulívinum er plantaður í Eysturoy. Kanska finnast fleiri frágreiðingar uppá hví hetta er so; í øllum førum staðfestir løgtingsvalið, sum eitt í røðini av fleiri peikandi parametrum, hesa serligu vinnulívs mentan ið má sigast at hava djúpar røtur her.

Tak valevnini og tinglimirnar fyri oynna, og hesi tala sítt týðiliga mál.

– Eysturoyggin er jú vinnulívsoyggin burturav, viðmerkti Alfred Olsen, umdømisvaldur fyri enn eitt valskeið vegna Sambandsflokkin.

– Munurin á okkum og teimum í Havn er ofta júst hetta at flestu tinglimir úr Eysturoy hava støði í vinnulívinum meðan tey í Havn ofta hava eina aðra bakgrund, til dømis í almennari umsiting.

Uttan at vit hava gjørt nakrar beinleiðis útrokningar viðvíkjandi hesum, kennist pástandurin so ótrúliga sannur.

Tað sama skínur ígjøgnum tá tú hoyrir Eysturoyar politikarar orðbera seg, uttan mun til hvønn flokk teir hoyra til. Hjartamálini umfata næstan altíð vinnulívið – og tað er kanska ikki so løgið. Tað sigst nevniliga at langt yvir helvtin av tí føroyska vinnulívinum hevur heimstað í Eysturoynni.



*Tað var telefonstormur á telefonina hjá Andrias Petersen valkvøldið*

# Andreas hevði framúr val

**Eftir at talan fleiri ferðir hevur verið um tætta kapping millum javnaðarmenninar í Eysturoy, tykist Gøta nú hava sett seg tungt á sessin**

JAVNAÐARFAGNAÐUR
*Jonhard Hammer*

Fer tað at eydnast Andriasi Petersen í Gøtu at varðveita sessin, sum hann hevur sitið í síðsta valskeiðið. Ella fer Dan R. Petersen í Fuglafirði at fáa sessin aftur, sum hann misti í 2002. Ella fer tað loksins at eydnast Sylverius Jacobsen á Skála at gerast javnaðartingmaður.

Hetta hava verið spurningar, sum ofta hava verið at hoyrt millum javnaðarfólk í Eysturoy undan valinum. Týskvøldið varð greitt, at Andreas Petersen í Gøtu framvegis er tingmaður fyri Javnaðarflokkin í Eysturoy. Javnaðarflokkurin í Eysturoy hevði eitt gott val, og allir teir tríggir omanfyri nevndu høvdu høg atkvøðutøl. Sum vera man fekk Sylverius Jacobsen mesta partin av sínum atkvøðum á Skála og Dan R. Petersen fekk mesta partin av sínum atkvøðum í Fuglafirði.

Andrias Petersen hevði eitt framúr gott val, og hann fekk væl fleiri atkvøður ymsta staðni kring oynna, enn hann áður hevur fingið. Sambært Jóannesi Hansen fekk hann fleiri atkvøður, enn nakar nakrantíð áður hevur fingið á javnaðarlistanum í Eysturoy. Gamla metið átti Jákup Fr. Øregaard. Metið setti hann, tá ið hann í 1974 fyri síðstu ferð var uppstillaður.

Tá ið valúrslitið var greitt týskvøldið savnaðist nógv fólk at heilsa upp á og fagna Andriasi Petersen. Har vóru javnaðarfólk ymsa staðni frá í oynni, og har var ein rúgva av gøtufólki, sum ikki øll hav a givið til kennar, hvønn politiskan lit tey hava. Blíðskapurin var stórur, og eina løtu slerdu tey ring og dansaðu føroyskan dans.





*Lagið var sera gott á eysturoyingum valkvøldið. Fólk úr allari oynni savnaðust heima hjá Andriasi. Fýrverkarí varð sent og eisini varð farið upp á gólv og kvóðu gøtumenn »Í Gøtu ein dag«*